# Undirvísingargongd til *Hodja úr Pjort*




**Ole Lund Kirkegaard**

***Hodja úr Pjort***

Myndir: Ole Lund Kirkegaard
Týtt: Pauli Nielsen
Bókadeild Føroya Lærarafelags 1984

**Um bókina**

Ole Lund Kirkegård hevur skrivað bókina *Hodja úr Pjort*. Í bókini eru skemtiligar tekningar, sum Ole Lund Kirkegård eisini hevur teknað. Bókin kom út á fyrst sinni í 1975.

Bókin Hodja úr Pjort er ein skemtilig søga um 9 ára gamla drongin Hodja, sum býr í landinum Bulgoslav. Hodja dámar illa at ganga í skúla, hann vil heldur sleppa út í stóru verð at síggja seg um. Ein dagin hittir Hodja gamla mannin el-Faza, sum lænir honum eitt flúgvandi teppi. Tá ið Hodja hevur vant seg at brúka teppið, fer hann avstað.

Hodja flýgur í fýra dagar og kemur til høvuðsstaðin Petto. Í Petto býr sultanurin, sum er ríkasti og mætasti maður í landinum.
Fleiri royna at stjala teppið frá Hodja og tað eydnast til síðst, men við góðari hjálp frá vinunum hjá el–Faza og góðum samstarvi kemur Hodja langt.

**Uppgávur**

Sára Mrdalo hevur gjørt uppgávurnar til *Hodja úr Pjort* við íblástri úr donskum uppgávum.

Uppgávurnar eru ætlaðar 4.-5. flokki og eru væl egnaðar til sjálvstøðugt arbeiði. Arbeitt verður við lesi- og skiljiuppgávum og tekniuppgávum. Síðsta síðan av uppgávunum er eitt stutt, einfalt bókaummæli, har næmingurin sigur sína hugsan um bókina. Brot úr bókini kunnu eisini brúkast sum fyrisøgn og málllæruundirvísing.

Skift kann vera ímillum, at lærarin lesur fyri næmingunum, meðan tey fylgja við í egnari bók, at næmingarnir lesa í bólki, ella tey lesa ein og ein. Mett verður, at tað tekur umleið 15 undirvísingartímar at lesa bókina og loysa uppgávurnar.